## Kappsigling á Skálafjørðinum

Árliga kappsiglingin millum 4- og 5-mannafør, sum Lions Club Eysturoy skipar fyri verður **sunnudagin 19 august.**

Byrjað verður annaðhvørt inni ella úti á fjørðinum, alt eftir hvussu veðrið verður. Málið verður á havnarøkinum í Saltangará.

Teir ið ætla at luttaka, skulu boða einum í siglingarnevndini frá í seinasta lagi **fríggjadagin 17 august.**

Upplýsingar hvussu siglt verður og skrásetingarnummar fæst somuleiðis frá siglingarnevndini.

Seglstøddin er max. 6,5 m² og mint verður á, at **allir luttakarnir skulu hava bjargingarbelti.**

Í samband við kappsiglingina verða lutaseðlar seldir, har ágóðin fer til vælgerandi endamál.

**Siglingarnevndin:** John tlf.221646 – Sigvald tlf. 288517- Óli tlf. 214742

**LIONS CLUB EYSTUROY**



# Sunnudagsskúli

## byrjar aftur aftaná summarfrí

Sunnudagin 19. august 2007
kl. 12.00 – 12.40

í Skúlaheiminum við Marknagilsvegin nr. 75.

**Øll børn eru hjartaliga vælkomin.**

Evangeliskt møti sunnukvøld kl.18.00, har bæði børn og vaksin eru hjartaliga vælkomin.

***Samkoman við Marknagil***





## Grundstykkir/jørð í Vági

Á Skálabø 2.253 m² og á Traðarfløtum 9.340 m² og tveir gyllin í Tofthaga, matr. nr. 357 og 358 – samlað ella hvør sær.

**Tlf. 21 63 65**

## Lýsing eftir handverkarum, arbeiðsfólki og maskinførara

Søkt verður eftir handverkarum, arbeiðsfólki og maskinførara til Sp/F WestTrading at byrja skjótast møguligt.

Arbeiðið umfatar alt jørð- og betong arbeiði við nútímans Hunnebech forskalling. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur kunnleika til forskallingsarbeiði, koyrikort til lastbil, kranaloyvi E og kunnleika til maskingrevstur.

West-Trading arbeiðir í høvuðsheitum í miðstaðarøkinum, men arbeiðið kann eisini koma fyri aðrastaðni í landinum.

Best er um umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt við einum møguligum arbeiðsholdi.

Góð løn verður goldin til tann rætta umsøkjaran.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til **Sp/F West-Trading**

Magnus Thomsen
Fartlf. 58 33 73
T-postur: wt@post.olivant.fo

Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

# Lærarastarv

## við Funningsfjarðar skúla

• 1 tíðaravmarkað parttíðarstarv, umleið 12-14 tímar, verður at seta skjótast til ber.

**Søkt verður eftir lærara, sum:**
• Undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
• Dugir at samstarva og er fyrikomandi
• Er fúsur at taka á seg uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum
• Vil vera við til framhaldandi at menna skúlan

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu sum meginreglu hava lærara-útbúgving, eins og ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum. Onnur eru tó eisini vælkomin at søkja.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir:**
Umsóknir við CV, avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 17. august, kl. 18.00

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Emil Jacobsen, skúlaleiðara, á telefon 441804 ella 741804.

Umsóknir vera sendar til:
Funningfjarðar Skúla
477 Funningsfjørður

**Funningsfjarða skúli** hevur 6 næmingar í aldrinum 1.-7. flokk.

# Pedagogar og hjálparfólk

Søkt verður eftir 2 pedagogum 30 tíma viku at byrja 1. og 15. septembur ella eftir nærri avtalu, og eftir 1 avloysara fyri hjálparfólki í farloyvi, 30 tíma viku, at byrja 15. septembur 2007.

Størvini eru í stovu við 20 børnum í aldrinum 3 til 5 ár, og stovu við børnum í aldrinum 6/7 ár.

**Tað vit krevja av tær, er**
• at tú tímir at vera saman við børnum inni sum úti og geva teimum nakrar spennandi og mennandi útfordringar / upplivingar
• at tú vilt verða ein partur av menningini av stovninum
• at tú vilt virka undir og saman við leiðsluni
• at tú ert opin fyri nýhugsan og broytingum
• at tú ert ein góður samstarvspartnari
• at tú kanst arbeiða ímillum 7.30 og 17.30

**Tað vit kunnu bjóða tær, er**
• 95 praktfull børn
• ríkidømi, ikki í pengum, men upplivingar og útfordringar frá og við børnunum, starvsfólki og foreldrum, og nógv aftrat

Tú kanst fara inn á heimasíðina www.margretha.fo og lesa meira um okkum.

Lønar- og setunarviðurskiftir eru eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og er lønarsatsurin 11 / 17 og 1 / 5.

Um ikki pedagogur / ar søkja størvini, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

Umsókn við avritið av prógvi og møgiligum ummælum verða at senda til :

Dr. Margrethu Barnagarð
Gerðagøta 14,
FO- Klaksvík
t-post: margretha@margretha.fo

Í seinasta lagi hósdagin 30. august 2007.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til leiðaran Marjuna Lassen á tlf. 455557 lokal 10.



# Hús á Glyvrum

Sethús á Glyvrum til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 449498 / 282002 / 227498**